Nú nærkast týðandi oljuboring:

# Fara undir royndarframleiðslu verður oljan funnin

**Fer boriskipið West Navion at raka við olju, tá tað borar skamt frá føroyska markinum í næsta mánað, verður farið undir royndarframleiðslu og kunnu Føroyar tá koma eitt týðandi fet nærri at gerast oljuframleiðandi tjóð**



OLJULEITING
*Jan Müller*

Nú tað hevur verið so kvirt leingi um oljuleiting á landgrunninum, merkir tað tó ikki, at einki rørist á hesum øki. Longu í næsta mánað kemur risastóra boriskipið West Navion á leiðina millum Føroyar og Hetland, har tað skal fara undir eina fyri føroyingar sera týdningarmikla boring. Brunnurin, sum skal borast, er í bretskum øki skamt frá føroyska markinum og ikki so langt frá Marjunbrunninum, sum Amerada Hess boraði í fjør og har fann munandi nøgdir av olju. At felagið hevur stórar vónir til hesa boring sæst m.a. á umhvørvislýsingini, sum Amerada Hess hevur almannakunngjørt í Bretlandi. Her stendur, at ætlanin er at testa brunnin, tvs. at fara undir eina royndarframleiðslu, um so er, at troffið verður við olju. Ein slík testing merkir, at man vil síggja, hvussu goymslan (reservoirið) og oljan eru háttað og bera seg at og um hesi vera grundarlag undir eini veruligari framleiðslu.

Í umhvørvislýsingini stendur m.a.: »If commercial hydrocarbons are found it may be necessary to »test« the well in order to obtain detailed information to evaluate the reservoir, which would involve flowing the well and flaring the hydrocarbons«. Við øðrum orðum sleppur olja at renna og verður gassið eisini brent av. Tvs. at fær Amerada Hess bingo, so vilja skip og bátar, sum koma framvið boriskipinum í september ella harum síggja loðan, sum so aftur kann bera boð um, at oljukeldan, ið funnin var á føroyska landgrunninum í fjør, møguliga er lønandi.

Aðrastaðni í skjalinum »Environmental Statement – Faroes Extension Well – Block 204/16« stendur m.a.: »AHL propose to drill an appraisal well in block 204/16 in the second quarter of 2002, currently targeted to commence in May. The operation to drill, test (if required) and abandon the well is expected to take approximately 87 days if commercial hydracarbons are detected. This Environmental Statement presents the findings of the environmental impact assessment undertaken by AHL for the proposed apprailsal well and the company´s response to the issues raised.«

Tvs. at talan er um eina boring, sum tekur í mesta lagi 87 dagar.
Umboð fyri Amerada Hess hava longu boðað frá, at tað er sera sannlíkt, at feltið, sum funnið varð í føroyskum øki, eisini gongur inn á bretskt øki. Harvið vil tað fyrsta føroyska oljufeltið nakrantíð verða bretskt eisini. Tað er so eitt úrslit av tí marknaavtalu, sum varð gjørd millum londini, og har miðlinjan gjørdist úrslitið. Sigast kann, at um føroyingar ikki fingu krav sítt um miðlinjumark, so hevði øll henda møguliga keldan ligið á bretskum øki og í víðasta konsekvensi vildi eitt mark nærri Føroyum merkt, at stórur partur av økinum, sum vit hava boðið út, vildi verið á bretskum hondum. Í marknaavtaluni við bretar verður møguleikin fyri at gera fund tvørtur um markið nevndur. Vil væl til kann nettupp hetta gerast ein av áhugaverdu spurningunum, sum fokus fer at verða sett á á altjóða oljumessuni í Stavanger seint í august. Bretski oljuráðharrin Brian Wilson verður hjástæddur og Sosialurin skilur, at tað er ikki óhugsandi, at føroyski starvsbróðurin Eyðun Elttør verður har eisini – og at nettupp hetta felags fundið kann gerast partur av dagskránni. Tað fáa vit tó ikki váttað.

Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess sigur við Sosialin, at teir sjálvandi eru sera spentir um komandi boringina. Men hann heldur tað er skeivt undan boringini at gera sær ov stórar vónir, hóast útlitini eru góð. – Her er so nógv, sum skal sampakka, skal talan vera um eitt lønanndi fund. Men ómøguligt er tað heldur ikki. Tað skal boringin í næstum geva eitt svar uppá sigur hann.


```
<script language="javascript1.1"><!--
  var javas=1;
//--></script>
<script language="javascript"><!--
  eigandi = "973"
<title>Eimskip Faroe Islands : Tænastur</title>

  <META name="Keywords" uppl_singar um starfsfólk og skrifstofur.">

  if(javas) {
    run = "1"
  } else {
<html>
  <head>
    <title>Eimskip : Um okkum</title>
<td><img src="/img/utlit/blar_kassi.gif" width="6" height="6" hspace="5" vspace="4" border="0" alt=""></td>
    <td width="100%">Tænastur<br>
    <a href="greinar.asp?cid=180">- flogfrakt</a><br>
    <a href="grein.asp?cid=177&aid=378">- fl_tigó_s</a><br>
    <a href="grein.asp?cid=177&aid=491">- smásendingar</a><br>
    <a href="grein.asp?cid=181&aid=388">- frígoymsla</a><br>
    <br>
    </td>
  </tr>
  <!--<tr valign="top">
Tracscape,Trackscape">

    <td><img src="/img/utlit/blar_kassi.gif" width="6" height="6" hspace="5" vspace="4" border="0" alt=""></td>
    <td width="100%">Búsló_arflutningar<br>
<td><img src="/img/utlit/blar_kassi.gif" width="6" height="6" hspace="5" vspace="4" border="0" alt=""></td>
    <td width="100%">Siglingalei_ir<br>
    <a href="grein.asp?cid=127&aid=679">- Frá Íslandi</a><br>
    <a href="grein.asp?cid=126&aid=683">- Til Íslands</a><br>
<a href="siglingaleidir.asp?cid=139&routeid=1L">- Ameríkulei_</a><br>
    <a href="siglingaleidir.asp?cid=139&routeid=2I">- Su_urlei_</a><br>
    <a href="siglingaleidir.asp?cid=139&routeid=2K">- Nor_urlei_</a><br>
    <a href="siglingaleidir.asp?cid=139&routeid=3S">- Strandsiglingar</a><br>
    <br>
<area href="http://www.eimskip.net" alt="The global overview for Eimskip websites"
</map>
```

EIMSKIP
www.eimskip.fo




UTTAN ÚR HEIMI

Búskapur og vinna:

## Nýggjur OPEC-leiðari

Orkumálaráðharrin í Venesuela, Alvaro Silva Calderon, er settur sum nýggjur aðalskrivari í felagsskapinum hjá oljuútflytaralondunum OPEC. Hann tekur við eftir Ali Rodguez.

Rodguez fór frá fyri nøkrum vikum síðani, tá hann fekk starvið sum stjóri í almenna oljufelagnum í Venesuela, PDVSA. Venesuela hevur í løtuni formansskapin í OPEC, og tí er tann nýggi aðalskrivarin eisini haðani.

Alvaro Silva Calderon sigur, at sum aðalskrivari ætlar hann sær ikki einans at virka fyri áhugamálunum hjá OPEC-londunum, men at hann eisini fer at virða áhugamálini hjá øðrum oljuframleiðandi londum.

## SAS tapti

Tað gongur sum kunnugt illa hjá skandinaviska flogfelagnum SAS, og í vikuni fekk felagið aftur ein frammaná.

Tað hendi, tá felagið tapti kappingina um atflyta alment starvsfólk í Noregi. SAS hevði hendan sáttmálan í fjør, men tapti nú ímóti tí lítla norska flogfelagnum Norwegian Air Shuttle. Sambært sáttmálanum kunnu tey 170.000 almennu starvsfólkini flúgva á norsku innanríkisrutunum fyri serprís. Eitt nú kostar tað teimum 850 krónur at flúgva millum Oslo og Tróndheim og 1500 krónur millum Oslo og Tromsø. SAS sleppur heldur ikki at flyta tey almennu starvsfólkini á rutuni til Keypmannahavnar. Ta uppgávuna fekk Sterling.

Norska stjórnin hevur samstundis gjørt sáttmála við fleiri útlendsk flogfeløg um at flyta almenn starvsfólk á altjóða flogrutum. Sáttmálar eru við KLM, Air France, British Airways, Finnair og SN Brussel Airlines.

# G8-stuðulin til Afrika alt ov lítil



*Leiðararmnir á G8-bólkinum, sum hittust í í Kanada. Frá vinstru Silvio Berlusconi úr Italia, Gerhard Schrøder úr Týsklandi, George W. Bush úr USA, Jacques Chirac úr Fraklandi, Jean Chretien úr Kanada, Vladimir Putin úr Russlandi, Tony Blair úr Bretlandi og Junishiro Koizumi úr Japan. Uttast til høgru umboðini hjá ES, spanski forsætisráðharrin Jose Maria Aznar og ES-nevndarformaðurin Romano Prodi*

*Mynd: Reuters*

**Hjálparfelagsskapir eru als ikki nøgdir við stuðulin, sum G8-londini hava játtað Afrika**

G8 OG AFRIKA
*Árni Joensen*

Tey ríku londini í G8-bólkinum samtyktu á toppfundinum í Kanada at játta Afrika 580 milliónir dollarar um árið tey næstu trý árini. Tað er lítið samanborið við uppskotið hjá ST-aðalskrivaranum Kofi Annan, sum segði tað vera neyðugt at lata afrikanska heimspartinum 10 milliardir dollarar, skal tað bera til at basa sjúkum sum malaria, tuberklum og AIDS.

Leiðarin í hjálparsamtakinum Ofram, Phil Twyford, sigur, at stuðulin frá G8-londunum munar einki og er í veruleikanum bert ein dropi í havinum. Í Ofram eru tólv hjálparfelagsskapir, sum m. a. virka í Afrika.

Talsmaðurin hjá Ofram, Mark Fried, sigur, at undan fundinum høvdu øll londini í G8-bólkinum lovað at veita munandi størri stuðul, so børn í tí fátæka heiminum kunnu sleppa í skúla. Heimsbankin hevur mett, at tað fer at kosta 15 milliardir dollarar at útvega 125 milliónum børnum skúlagongd. Men nógv restar í, og í síðstu viku boðaði tað ríkasta landið, USA, frá, at tess stuðul til skúlagongdina verður bara 20 milliónir dollarar næsta ár.

- Tað svarar til 28 cent til hvørt barnið og ger við øðrum orðum ongan mun., sigur Mark Fried. Hann biður amerikansku stjórnina spegla sær í teirri japansku, sum hevur gjørt av at játta fimm milliardir dollarar tey næstu fimm árini.

# USA krevur serreglur fyri sínar ST-hermenn

**Amerikanska stjórnin hóttir við at nýta sýtingarrættin, um hermenn í ST-tænastu kunnu dragast fyri altjóða revsirættin**

USA OG REVSIRÆTTURIN
*Árni Joensen*

Amerikanska stjórnin hevur sýtt fyri at skriva undir sátmálan um altjóða revsirættin, sum verður settur á stovn tann 1. juli, og nú hóttir stjórnin við at taka tað fyrsta stigið ímóti rættinum.

Ætlanin var, at trygdarráðið hjá ST skuldi leingja heimildirnar hjá friðarvarðveitandi løgregludeildunum í Bosnia hósdagin, men málið mátti útsetast. tí USA sýtti fyri at taka undir við tí. Amerikanski ST-sendiharrin, John Negroponte, segði, at um neyðugt fer USA at nýta sýtingarrættin ímóti málinum.

Amerikanska stjórnin ber ótta fyri, at amerikanskir hermenn og yvirmenn kunnu verða drignir fyri tann nýggja altjóða revsirættin í Haag av politiskum orsøkum, og tí hevur stjórnin kravt, at amerikanskir hermenn og løgreglumenn í ST-tænastu skulu ikki kunna dragast fyri rættin.

Hetta vilja hini londini ikki góðtaka.

Úr Norðurlondum:

## Fekk skeivt blóð

Fylkislæknin í Norðurnoregi vil hava kannað, hvussu tað kundi bera til, at ein sjúklingur fekk skeivt blóð á norðurnorska Universitetssjúkrahúsinum í síðstu viku.

Gerd Ersdal, fylkislækni sigur, at málið er sera álvarssamt, tí eitt mistak sum hetta eigur ikki at henda.

Í mars doyði ein sjúklingur á sama sjúkrahúsinum, eftir at hann hevði fingið skeivt blóð. Tað sama mundi hent fríggjadagin í síðstu viku, men til alla lukku varnaðist sjúklingurin sjálvur, at alt ruggaði ikki rætt.

## Færri verða doypt

Flestu foreldur í Danmark doypa síni børn, men hagtølini vísa kortini, at talið á børnum, sum verða borin til dópin, er minkað nógv.

Á tølunum sæst, at 20 prosent av teimum børnunum, sum vórðu fødd í 2000, høvdu ikki verið til dópin, tá tey fyltu eitt ár. Í Keypmannahavn høvdu uppaftur færri ársgomul børn verið til dópin.

Hans Raun Iversen, lektari á lærda háskúlanum í Keypmannahavn heldur, at gjógvin millum tað vanliga danska fólkið og kirkjuna er vorðin breiðari tey seinnu árini. Ein annar granskari, Johan Peter Paludan, sigur, at tann gamli siðurin at doypa smábørnini er viknandi í Danmark.

## Fáa færri børn

Bergens Tidende skrivar, at talið á nýføðingum í Bergen er nú so lítið, sum tað ikki hevur verið seinastu fimtan árini. Sum gongdin hevur verið higartil í ár, koma umleið 4600 børn í verðina í Bergen í ár, og tað eru 300 færri enn í fjør. So lítið hevur talið ikki verið síðani 1987. Hagtøl vísa, at tað er ikki bara í Bergen, at barnatalið fellur, men at hetta er galdandi fyri megin-partin av Noregi.